## Bók um Palin

Fyrrverandi guvernørurin í Alaska Sarah Palin, sum eisini royndi seg sum varaforsetaevni á seinasta forsetavalinum í USA, hevur júst lagt seinastu hond á eina bók um lív sítt. Bókin, sum hevur fingið heitið „Going Rogue: An American Life", skuldi upprunaliga koma út til várs, men høvundurin hevur skrivað skjótari, enn forlagið hevði væntað, og tí er útgávan framskundað til miðjan november, skrivar AP. Sarah Palin segði guvernørstarvið í frá sær í summar. Hon er 45 ára gomul, so tað kann væl henda, at tað kemur ein ævisøga afturat seinni.



## Eingin royking í 2040

Fakfeløg, samtøk og stovnar heittu í gjár á finsku stjórnina um at fremja neyðug lógartiltøk, so øll royking verður bannað aftan á 2040. Í áheitanini verður sagt, at skal hetta lata seg gera, er neyðugt at minka tubbaksnýtsluna 10 prosent um árið hetta til 2040. Tað var formaðurin í finska felagnum ímóti krabbameini, Pekka Puska, sum handaði Matti Vanhanen, forsætisráðharra áheitanina. Tey seinastu hagtølini siga, at fjórði hvør finnlendingur festir sær í. Tá eru bara tey vaksnu tald við. Á hvørjum ári doyggja umleið 6.000 fólk av sjúkum, ið hava samband við royking, skrivar NTB.




*Tá ið Jóannes Eidesgaard almannakunngjørdi fíggjarlógina fyri næsta ár, helt hann, at málsetningurin hjá samgonguni hevur eydnast í stóran mun*

# halli næsta ár

Tá ið útreiðslurnar so samstundis veksa, er tað greitt, at hallið má veksa.

Tí er tað tann stóra avbjóðingin at fáa tamarhald á hallinum.

Men tað skal gerast uttan at traðka so hart á bremsuna, at tað fer at elva til økt arbeiðsloysi.

Tað er nevniliga eisini ein týðandi almenn uppgáva at tryggja, at taka broddin av arbeiðsloysinum, tá ið tíðirnar versna, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Tí hevur landsstýrið lagt dent á, at tær íløgur, sum verða gjørdar, skulu kasta so nógv arbeiði av sær sum gjørligt.

Samstundis er dentur lagdur á at spjaða íløgurnar um alt landið.

Av tí sama eru allar tunnilsætlanir útsettar, tí tær kasta ikki so nógv arbeiði av sær.

Hetta er ikki løtan at fara undir tunlar og fara vit undir tunlar nú, kann tað máa trúvirðið undan samgonguni, tí samstundis eru intriv gjørd í vælferðarøkið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hinvegin er peningur settur av til at bjálva og umvæla almennar bygningar.

Ein slík flótandi granskingarlund kann verða ein góð byrjan uppá at menna granskingarumhvørvið í Føroyum, helt landsstýrismaðurin.

Samstundis er peningur settur av til nýtt havrannsóknarskipm, sum skal byggjast í Føroyum, fyri at sparka lív aftur í føroyskt skipasmíð, sum er at kalla deytt.

Samstundis er munandi meiri sett av til at byggja eldraøkið út fyri og til at byggja bústaðir til fólk við serligum tørvi.

Vegarbeiðið, sum Landsverk hevur í gerð, skulu halda fram og hartil skal umvælingin av Landssjúkrahúsinum halda fram.

Annars ivast hann ikki í, at tað fer at vera ein øgiliga torført talv at finna eina semju um fíggjarlógina.